## Skelkað av funnum líki

Foreldrini hjá teirri rændu smágentuni Madelaine McCann, (myndin) fingu ein rættiligan skelk, tá ein blaðmaður frá einum kendum dagblaði í Portugal tiðliga í morgun ringdi fyri at vita, hvat foreldrini høvdu frætt um funnað líkið. Hetta varð funnið í einari havn skamt harfrá, sum Madelaine varð rænd. Av tí at tað var so tíðliga á morgni, hevði portugisiska løgreglan ikki latið foreldrini vita nakað um líkið, sum kortini vísti seg at vera ein enskur maður og ikki ein genta. Hetta vistu foreldrini tó ikki, tá blaðmaðurin ringdi og tí vórðu tey so skelkað.



## Rænd og hópneyðtikin

Ein 22-ára gomul kvinna kom ongantíð heim frá Vordingborg Festuge í gjárkvøldið. Hon bíðaði eftir nøkrum vinkonum við jarnbreytarstøðina í Vordingborg, tá ein hvítur Toyota kassabilur koyrdi yvir til hana og ein maður á vánaligum enskum spurdi um veg. Tá kvinnan fór yvir til bilin leyp ein maður út og skumpaði hana inn í bilin. Teir koyrdu eitt stutt petti og steðgaðu síðani og neyðtóku kvinnuna upp á skift. Talan var um tríggjar mans. Kvinnan varð seinni slept av í býnum.

# Hví fríggjadagur tann 13. er óheppin

**Her á landi, eins og í meginpartinum av framkomna heiminum, er fríggjadagur tann 13. eitt fyribrigdi, ið øll kenna. Men hvussu er hendan pátrúgvin uppstaðin? Og er tað veruliga so, at dagurin er óheppin?**

PÁTRÚGV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Paraskevidekatriafobi!

Tað er heitið fyri fólk, sum hava ein órímiligan ótta fyri fríggjadegi tann 13. So vita vit tað.

Men tað er á ongan hátt ókent, ikki at byrja nakað ein fríggjadag, og teir eru mangir skiparar, ið ikki fara avstað ein fríggjadag. Spurningurin er bara, hvar hetta stavar frá.

Í »British Medical Journal« stóð í 1993 at lesa um eina kanning, nevnd »Is Friday the 13th Bad for Your Health?« Hon viðgjørdi úrslitið av eini kanning, sum sammetti farðsluóhapp í mun til ferðsluna máld fríggjadag tann 6. og fríggjadag tann 13. yvir nøkur ár. Tað vísti seg, at á máldu økjunum vóru munandi fleiri óhapp við innleggingum á sjúkrahúsum til fylgju tann 13. enn tann 6. – og tað sjálvt um ferðslan tann 13. ofta var minni enn annars, júst tí fólk lótu bilin standa tann dagin orsakað av pátrúnni. Munurin kom heilt upp í 52%.

Sjálvandi skal hetta takast sum tað er, tí eingin einstøk vísindalig kanning er nóg gott grundarlag at byggja eina teori uppá.

Sætti dagurin í vikuni og talið 13 hava bæði ringt orð á sær, og tá so hesi falla saman eina til tríggjar ferðir um árið, er tað nakað, ið ávirkar mong. Onkur vil vera við, at hetta er mest útbreidda pátrúgvin av øllum. Onkur hættar sær ikki til arbeiðis ein slíkan dag; og mong aftra seg við at giftast tann dagin.

Mett verður, at eini 8% av øllum vesturlendingum hava paraskevidekatriafobi. Flestu halda, at hetta er ein aldargomul pátrúgv, men eingin kann siga við vissu hvussu gomul hon er.

### 13: Dusin djevulsins

Tað merkir óhepni, at 13 fólk sita til borðs.Turkar líktust so illa á talið 13, at tað púrasta varð tikið burtur úr orðabókum teirra. Fleiri býir hava onga 13. Street ella 13. Avenue, og mong høghús hava onga 13. hædd.

Eisini verður sagt, at hevur tú 13 bókstavir í navni tínum, hevur tú »djevulsins hepni«. Nevnast kunnu Jack the Ripper, Charles Manson, Jeffrey Dahmer, Theodore Bundy og Albert De Salvo. Og tað eru 13 trøllkonur í eini samling.

Hví talið 13 er vorðið óeydnistal hjá monnum, er ikki heilt víst, men tað finnast ein ørgrynna av frágreiðingum um, hví so er. Flestu meta hetta fyribrigdi at vera aldargamalt, og ein teori gongur út uppá, at menn tíðliga í tíðini bert kundu telja á tíggju fingrum og tveimum beinum, altso upp í 12. 13 – ella tað, sum lá omanfyri 12 – var fyri teimum eitt loyndarmál. Ein kann so bara spyrja seg sjálvan, um upprunamenn ikki høvdu tær.

Hvussu var og ikki, vóru tað ikki øll upprunafólk, sum mettu 13 vera óeydnistal. Kinesarar hildu talið vera heppi og tað sama var galdandi fyri egyptar á Farao'sa døgum.

Hjá gomlu egyptunum var lívið ein sálarlig ferð, sum fór fram í stigum, 12 í tali, har hitt 13. var deyðin. Ikki deyðin sum endin og rotanin av likaminum, men sum byrjanin til æviga lívið og tískil nakað, ið øll tráaðu eftir. Sjálvt um egyptiska civilisatiónin fall, yvirlivdi trúgvin upp á 13-talið, til hon at enda broyttist til ræðslu fyri deyðanum.



*Charles Manson er ein av kendastu hópdrápsmonnunum í heiminum. Sjálvur myrdi hann ongan, men fekk sínar »disiplar« at drepa fyri seg. Serliga kent er morðið á Sharon Tate, ið var við barn og gift við Roman Polanski, kenda filmsleikstjóranum*

Ein onnur teori er, at patriarkalar religiónir hava við vilja gjørt 13 til eitt óeydnistal, tí talið av gudinnu-tilbiðandi mentanum var hildið høgt í metum. Talið samsvarar við lunara (menstruella) syklusin í einum ári (13x28=364 dagar).

Gomlu hinduarnir í eystri hildu, at tað var óheppi hjá 13 at savnast nakrastaðni, til dømis til borðs, og tað sama var, so løgið tað annars ljóðar, galdandi í norðurlendskari mytologi. Søgan er henda:

Tólv gudar vóru bodnir til gildi í Valhøll. Loki, óndi gudurin, var við vilja ikki boðin við. Men hann kom kortini og harvið gjørdist talið til 13. Loka líkt skapti hann ófrið og fekk Hod, blinda vetrargudin, at leggja á Baldur hin góða, sum var væl lýddur av hinum gudunum. Hod tók eitt spjót av mistilteini, sum Loki gav honum, og rendi tað eftir Balduri, ið doyði á staðnum. Øll Valhøll syrgdi. Og norðurlendingar hava hereftir mett 13 til borðs verða óeydnu.

Eisini í Bíbliuni verður talið 13 nevnt. Tað vóru 13 til borðs seinastu kvøldmáltíðina, og sum vit øll vita, sveik ein teirra, Judas, Jesus. Eisini er vert at nevna, at Jesus bleiv krossfestur ein fríggjadag.

### Óhepni fríggjadagur

Ikki at byrja nakað ein fríggjadag er vælkent. Hetta vildi enski kongurin mótprógva einaferð með alla. So hann læt HMS Friday byggja. Kjølurin varð strektur ein fríggjadag, skipið fór av bakkastokki ein fríggjadag, manningin mynstraði ein fríggjadag, og hann setti enntá ein mann, nevndan Jim Friday, sum skipara. Skipið fór sína jomfrúferð ein fríggjadag – og síðani hvørki hoyrdi ella sá nakar nakað til skipið aftur.

Óhepni fríggjadagur gongur annars alla leiðina aftur í Edens Hava. Tað skal hava verið ein fríggjadag, at Eva freistaði Adam við súreplinum. Syndaflóðin byrjaði ein fríggjadag, Guð skilti tungumálini hjá monnunum, ið bygdu Bábelstornið, ein fríggjadag, templið hjá Sálomon kongi var lagt í oyðu ein fríggjadag, og fríggjadagur var eisini dagurin, tá Jesus varð krossfestur.

At enda kunnu vit eisini nevna, at fleiri filmar eru gjørdir um hetta temaið, nevniliga ein røð av »Friday the 13th« við fyrst Freddy Krueger og síðani Jason Voorhees. Eisini kunnu nevnast »A Nightmare on Elm Street«-filmarnir.